# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Maktkampur

Tað er ikki óvanligt, at eisini samgongupolitikarar høggast í sambandi við eina fíggjarlógarviðgerð. Fíggjarlógin er jú sjálv lívæðrin og hjartapumpan, sum rekur almennu Føroyar. Og fíggjarlógirnar broytast alt eftir, hvussu búskaparliga støðan er í samfelagnum. Eitt hall, sum nærkast einari milliard, vil sjálvsagt altíð skapa brotasjógvar.

Henda fíggjarlógarviðgerðin er einki undantak í so máta. Fíggjarmálaráðharrin, sum eisini er formaður Javnaðarfloksins, hevur sett síni avgjørdu fingramerki á uppskotið við at raðfesta sokallaðu bleytu virðini høgt og afturfyri útseta kostnaðarmiklar tunnilsverkætlanir.

Tað er greitt, at hetta skapar trupulleikar bæði í egnum flokki og serstakliga í hinum samgonguflokkinum, Fólkaflokkinum, tí enn sterki maðurin har, Anfinnur Kallsberg hevur sett nýggjan tunnil í Norðoyggjum fremst á sín ynskilista fyri ikki at siga kravlista.

Tað kunnu helst vera nógvar tulkingar av hesi "krígsstøðu", sum hevur tikið seg upp millum tveir av sterku monnunum í føroyskum politikki, og ein er so tann, at Eidesgaard longu hevur sett Kallsberg í skákmát. Við at tryggja sær undirtøku í landsstýrinum og millum fíggjarnevndarlimir hevur Eidesgaard longu útvegað sær besta trumfkortið, tá telvast skal av álvara um fíggjarlógaruppskotið á heimabeitinum hjá Kallsberg, nevniliga tí so maktfullu fíggjarnevndini.

Tað eru tey, sum tosa um samgonguslit og nýval og siga, at formaður Javnaðarfloksins við síni avgjørdu støðu í veruleikanum hevur lagt upp til eitt komandi valstríð. Vit duga illa at ímynda okkum, at meiriluti er í Fólkaflokkinum fyri at seta sína luttøku í samgonguni uppá spæl fyri eitt berghol í Norðoyggjum. Sum málið sær út í løtuni hevur Kallsberg neyvan nakað annað val enn at leggja kongin á hesum sinni, men stóri spurningurin er so, um henda eyðmýking fer at hava aðrar óhepnar avleiðingar við sær í framtíðini fyri samgongustevið! Kann tað eisini hugsast, at tað eru so sterkar kreftir í Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, sum vilja sleppa av við Fólkaflokkin, m.a. orsakað av ikki nøktandi fiskivinnupolitikkinum, at vit fara at síggja eitt slit í hesum árinum, og at hurðarnar verða latnar upp fyri Tjóðveldi! Einki er vist í politikki. Tað, sum varð óhugsandi í gjár, ber væl til í morgin.

Vit gita, at Fólkaflokkurin ongan hug hevur til at geva umrøddu kreftum henda møguleikan, og tí heldur velur at halda seg kúrran, tá fíggjarlógin kemur til endaliga viðgerð. Tað vildi eisini verið ein fallitstøða fyri ABC flokkarnar, um teir longu eftir eitt ár skulu fara út til Føroya fólk og biðja tey velja av nýggjum. "Maktkampur" var yvirskriftin her í blaðnum í gjár. Helst er hetta rætta myndin av aktuellu støðuni. Og hesaferð tykist vinnarin at gerast formaður Javnaðarfloksins, sum so sanniliga eisini hevur brúk fyri hesi profilering skal honum og flokkinum verða lív lagað. Men tað kemur aftur ein dagur, og vitandi, at Kallsberg er bæði klókur og snúðin, so verður hetta neyvan seinasta orðið frá hansara síðu. Hann er framvegis formaður í maktfullu fíggjarnevndini.

**Sosialurin**

## Nær hava politikarar í Suðurstreymi skorða undir tunlar

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Flestu miðsavningarpolitikarar ynsktu, at klandur fór at spyrjast burturúr, hvør av tunlunum – til Klaksvíkar ella Vágatunnilin - í síni tíð skuldi gerast fyrst. – Men her varð hepnislig finta framd**

Lat tað verða gjørt púra greitt, at politikarar í Suðurstreymi hava ongantíð lagt seg eftir, og skorða undir at fáa tunlar ella samferðslukervið útbygt í útjaðaran. Teir hava verið drignir við og luttóku, eftir at teir mistu endan.

Fara vit eitt sindur aftur í søguna, minnast vit, at bæði Edmund Joensen, núverandi tingmaður og táverandi løgmaður saman við tingmonnum í Suðurstreymi fóru enntá so vítt, at teir í donskum fjølmiðlum niðurgjørdu og mótmæltu, at tað so mikið sum, skuldi hugsast um at gera undirsjóvartunlar. – Tó kláraðu teir ikki at seta fót fyri, heldur ikki við danskari hjálp – tíbetur!

Øll síggja ídag hvussu gott tað var, at hesir afturhaldshugaðu taptu, meðan framtakshugaða fólkið vann. – Vit síggja ídag úrslitið, samstundis sum vit skulu leggja okkum í geyma, at um hesin peningur ikki var brúktur væl, var hann farin í endaleysan rakstur í eitt passiviserað samfelag.

**Jóannes og Annika einki at hava tað í**

Tá Jóannes Ejdesgaard, fíggjarmálaráðharri og Annika Olsen, landstýriskvinna í samferðslumálum siga, at "Sandoyartunnilin og tunnilin norður um fjall koma, men bara ikki nú", eiga vit øll at minnast til, at tey hava onki at hava hetta í. Hetta er – milt sagt – bara fyri at kyrra, fyri ikki at kalla tað "at halda fólki uppi við práti", tí her skal onki henda.

Latið okkum hava í huga, at tær 42.5 mill. krónurnar, sum nú verða strikaðar til Norðoyatunnilin, fara nú í ein ov tyngdan almennan yvirbygning, sum aftur fer at skapa størri rakstrarútreiðslur og samfelagið, sum dag fyri dag missir dynamikk og fer longur út á sjógv.

Føroysku rakstrarútreiðslurnar eru hækkandi meðan íløgurnar liggja niðri ímóti 5 prosentum av fíggjarlógini. Flestu íløgukrónirnar til sokallaðu "bleytu virðini". Hetta er aftaná at Ejdesgaard hevur sminkað fíggjarlógina við at renna ymist yvir á íløgur, sum veruðliga hoyra undir rakstur.

Tað sæst týðiliga, at politikarar uttanfyri høvuðsstaðin eru meiri og minni útspældir.

So ósamdir sum Jóannes og Edmund mangan eru, eru teir samdur um eitt. Tað er miðsavnan av føroyska samfelagnum.

Havið í huga, at Vágatunnilin og Norðoyatunnilin eru framdir, hesar tunlar sum ongin føroyingur ídag vildi verið fyri uttan, eftir trýsti frá hesum báðum økjum.

## Tøkk til Kaj Leo Johannesen

PETUR MOHR

Fyrst av øllum vil eg siga, at eg aloftast eri ósamdur við Kaj Leo Johannesen, men at virðingin fyri løgmanni gjørdis nógv størri eftir at hava hoyrt hann í tíðindinum í útvarpinum kl 18. Tað er alla æru vert at onkur enduliga torðir at tosa í móti fagfelagsrørsluni.

Eg eri púra samdur við løgmanni tá hann sigur at "…hvar er samhaldsfesti í tí…" har hann sipar til, at fagfeløgini ikki vilja strika lønarhækkingina, og samstundis harta landsstýrið fyri at skerja vælferðina. Um mann vil hava tamarhald á undirskotinum á fíggjarlógini, hvussu kann mann so fíggja eina lønarhækkan, uttan at mann má taka peningin frá onkrum øðrum? Ella skal mann heldur hækka skattin?

Er tað góður fíggjarpolitikkur at hækka skattin tá tað er ein afturgongd í búskapinum? Nei. Tað, at hækka skattin, ger at tað privata húsarhaldi fær minni pengar at ráða yvir, og tað gerð at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum minkar. Tað hevur við sær at tann privata vinnan hevur eina minking í inntøkum, og má møguliga siga fólki úr starvi, og so kemur tað minni inn í skatti.

Sjálvandi er tað rætt at lønirnar hækka, men er tað rætt at hækka lønirnar, tá tað gongur útyvir onnur? Tað vil eg ikki halda er samhaldsfesti.

So enn eina ferð. Takk Kaj Leo Johannesen, løgmaður. Takk at tú torir at siga tína meining móti einari rørslu, har tað ikki hevur verði "loyvt" at kritisera.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.